## HEILSANIR



**Góða Oda**
Tillukku við 40 ára føðingardegnum.
**Heilsan frá okkum á Traðagøtu**



**Góða Anna**
Hjartaliga tilukku við 14 ára føðingardegnum 17. juni.
**Kærastu heilsanir mamma, babba og Aksel**



**14?**
Are you sure? hæh. Til lukku við gjárdegnum kera.
**heilsan grýlurnar**

# Samkomur fáa íblástur úr Argentina

**Ein av lyklapersónunum í stóru vekingini í Argentina vitjar í Føroyum seinni í hesum mánaðinum.**



*Pablo Deiros vitjar nú í Føroyum og fer seinni í mánaðinum at hava møtir í Kelduni í Skálabotni*

**Skálafjørður:** Í døgunum 27.-30. juni skipar Karisma fyri møtum í Kelduni í Skálafirði. Talari verður Pablo Deiros, ein av best umtóktu bíbliulærarunum í Suðuramerika.

Deiros er ættaður úr Paraguay, men er í dag leiðari í eini 114 ára gamlari baptistakirkju í Buenos Aires. Henda samkoman verður av Fuller School of World Mission nevnd at vera ein fyrimynd í samkomuvøkstri.

Sagt verður, at Pablo Deiros er ein av lyklapersónunum í vekingini í Argentina. Henda vekingin hevur nú vart í samfull 25 ár, og hevur givið íblástur til vekingarnar, bæði í Toronto og Pensacola.

Pablo Deiros hevur skrivað fleiri enn 30 bøkur, har hann viðger teologisk evni, men eisini almenn kristin evni.

Áhugavert við vekingini í Argentina er, at hon hevur breitt seg til mangar ymiskar trúargreinar, bæði hvítusunnusamkomur og tær meira konservativu, so sum baptistar, plymouthbrøður, mennonittar og onnur. Ein menning, har Deiros hevur átt sín stóra lut í.

Pablo Deiros undirvísir eisini á Fuller School of Intercultural Studies í Pasadena í California. Har er hann professari í missiónssøgu, og undirvísir eisini í útfrían, andaligari krígsførslu og likamligari grøðing. Hann hevur eina ápostóliska leiðaratænastu, har hann hjálpir leiðarum við teimum avbjóðingum og trupulleikum, sum teir møta í dag.

Sum hann sjálvur sigur:

- Eg geri hetta í kraft Heilaga Andans og við teimum gávum, sum eg í Hansara náði havi fingið.

**sb.**




